# A G A N E V N D I N

**KÆRA 3/2017**

| *FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Kæra um 2 daga leikbann til B36-venjara fyri málburð um dómaraavrik** | |
| Deild: Lið í Effo-deildini | Hvør hevur reist málið: B36 |
| Kapping: Løgmanssteypið | Kæra móttikin: 10.6.2017 |
| Møguligt brot framt: 25.05.2017 | Kærugjald goldið: Ja |
| Partshoyring: Nei | 5 daga kærufreist hildin: Ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: Nei |

## Úrskurður

Vísandi til grein 5, litra g og k í agareglugerð FSF's, er Aganevndin komin til ta niðurstøðu, at nevndin ikki metir seg málsføra at viðgera kæru frá B36 um 2 daga leikbann til venjaran Jákup á Borg.

Kæran verður tí avvíst.

## Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli

B36 kærir avgerð hjá Kappingarnevndini um 2 daga leikbann til venjaran Jákup á Borg fyri úttalilsi hansara um dómaraavrikið í steypadystinum móti HB í útvarpsrásini Rás2 eftir dystarlok hin 25.5.2017.

## Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Vísandi til grein 5, litra g og k í agareglugerð FSF's, er Aganevndin komin til ta niðurstøðu, at hon ikki metir seg málsføra at viðgera hesa kæru frá B36:

Objektivt kann staðfestast, at talan fyri tað fyrsta ikki er um eina kæru um "leikbann í meira enn 3 dystir", soleiðis sum ásett í grein 5, litra g í agareglugerðini. Harnæst metir Aganevndin heldur ikki, at talan er um eina kæru, sum er fevnd av grein 5, litra k, har ymsar avgerðir hjá Kappingarnevndini kunnu kærast til Aganevndina, nevniliga tá talan er "um átalu, ávaring, ella bót í samband við innkomnar dómara- og eygleiðarafrágreiðingar, ella viðurskifti, sum koma kappingarnevndini til kunnleika á annan hátt, viðvíkjandi brot á kappingarreglur og brot á fyrisitingarlig viðurskifti, eitt nú ov vánaliga trygd, óhøvuskan atburð, fløskur inn á vøllin ella aðrar serligar hendingar".

Aganevndin metir ikki, at orðingin "brot á fyrisitingarlig viðurskifti" í hesi grein kann toyggjast til at fevna um fyrisitingarligar mannagongdir og viðurskifti hjá einum sjálvstøðugum umsitingarmyndugleika í FSF, sum Kappingarnevndin er. Kappingarnevndin hevur egið málsføri í ávísum málum sambært teimum reglum og leiðreglum, sum eru samtyktar av FSF. Soleiðis er við ásetan av leikbanni sambært § 37 í Kappingarreglunum fyri fótbólt og sum neyvari nágreinað í Vegleiðing um leikbann.

Harnæst verður víst á, at Aganevndin ikki er ein fyrisitingarligur dómstólur, men ein aganevnd. Aganevndin hevur ikki heimild at geva myndugleikum FSF´s átalu ella aðra sekt fyri møgulig brot á fyrisitingarligar meginreglur so sum partshoyring, grundgeving, heimildartilvísing,

| | |
|---|---|
| kæruvegleiðing o.t. Heimildirnar hjá Aganevndini fevna hinvegin um **at** eftirmeta ta agarevsing, sum heimilaðir myndugleikar í FSF hava givið einstaklingum og feløgum fyri brot á regluverkið og í øðrum lagi, **at** gera úrskurð og áseta sekt fyri brot á regluverkið framd av einstaklingum og feløgum, tá Aganevndin hevur málsføri sum fyrsti instansur sambært agareglugerðini.<br><br>Við støði í hesum, vísir Aganevndin kæruni frá B36 um 2 daga leikbann til venjaran, sum er ásett av Kappingarnevndini, frá sær. |
| **Fakta í málinum** |
| Óviðkomandi. |
| **Lógarverkið** |
| Sambært **§ 5, litra h** í agareglugerðini, kunnu avgerðir hjá Kappingarnevndini um leikbann í meira enn 3 dystir kærast til Aganevndina. |
| **Staðfestingar, metingar og niðurstøða** |
| Óviðkomandi. |
| **Kæruvegleiðing** |
| Sambært grein 9 og grein 12 í agareglugerðini, kann henda avgerð ikki kærast. |
| **Staður, dagfesting og undirskrift:**<br><br>**Tórshavn 13. juni 2017**<br><br>Anni á Hædd<br>**Anni á Hædd, forkvinna** |
| Aganevndin, ið viðgjørdi hesa kæru: Anni á Hædd, løgfrøðingur og forkvinna, Ken Nónklett, løgfrøðingur og næstformaður og Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi. |